# Ókeypis falltrygd fyri eldri

**Ert tú komin upp í árini**, og hevur tú hug at hjúkla um tína rørslugleði leingi afturat?

**Arbeiðir tú við rørsluførleika** hjá eldri fólki ella fólki við rørslutarni, og hevur tú hug at fáa íblástur til venjingar og amboð, sum gera mun bæði kropsliga og mentalt?

So kom til eina **ókeypis venjing í falltrygd**, har vit læra at detta uttan at fáa mein - og at koma upp aftur sjálvstøðugt óansæð førleika og møgulig rørslutarn.

Øll detta, men eldri eru í størri vanda fyri álvarsligum skaða og longri eftirbata. Tíbetur kunnu øll **læra at detta trygt** uttan at fáa mein, og hetta eru vit judoíðkarar serfrøðingar í.

Vit leggja okkara bleytu judomottur á gólvið og hava **ókeypis undirvísingar** hesi støðini. Eingin tilmelding krevst, og ikki er neyðugt at vera limur í ymsu feløgunum fyri at luttaka. Eftir tiltøkini er ein lítil drekkamunnur og høvi at práta við undirvísararnar.

| **Mikudag 22. oktobur** | **Hósdag 23. oktobur** | **Fríggjadag 24. oktobur** |
|---|---|---|
| **Vestmanna**<br><br>Kl. 15:00 til 16:00<br><br>Gomlu sýslumanshúsini | **Giljanes**<br><br>Kl. 15:00 til 16:00<br><br>Fimleikahøllin í skúlanum á Giljanesi | **Klaksvík**<br><br>Kl. 13:30 til 14:30<br><br>Fimleikahøllin í skúlanum á Skúlatrøð |
| **Tórshavn**<br><br>Kl. 18:00 til 19:00<br><br>Høllin á Hálsi (niðriundir) | | **Oyrarbakki**<br><br>Kl. 16:00 til 17:00<br><br>Fimleikahøllin í skúlanum við Streymin |

**Fyriskiparar** eru Judo Føroyar, Landsfelag Pensjónista, Havnar Judofelag, Vága Judofelag, Klaksvíkar Judofelag, Sunda Judofelag og pensjónista- og eldrafeløgini í Vestmanna, Tórshavn, Klaksvík, Vágum og á Oyri.

**Stuðlað tiltøkunum** hava breiddarpuljan hjá ÍSF og evropeiska judosambandið.